07 VESTUR — HAVNAR BÓLTFELAG 1904

Kappingarárið 2017

**3. juni**



**Leikskrá nr. 4**

07 Vestur
Postboks 51
370 Miðvágur

Formaður:
Jim Sonni Guttesen
jims@jims.fo

Næstformaður:
John Weihe
jwveiting@gmail.com

Kassameistari:
Jón Nordendal
jon@lbf.fo

Nevndarlimur:
Egil Petersen

07 Vestur leikskrá
Útgevari: 07 Vestur

Ábyrgd:
Fróði Poulsen

Myndir og greinar.
Jóanis Albert Nielsen
Ingolf S Olsen
Jarnhold Nattestad
Fróði Poulsen

# 07 VESTUR leikarin

**Navn:** Høgni Egilstoft Nielsen
**Aldur:** 20 ár
**Hædd:** 180 cm
**Vekt:** 78 kg (reint stál)
**Yndis matur:** Eri av garðsslagnum, bara mongdin er, so er í lagi.
**Títt pláss á vøllinum:** Miðja.
**Vinstra ella høgra bein:** Høgra.
**Onnur feløg tú hevur leikt við:** SÍF og 07 Vestur
**Hvørjum liði heldur tú við, og hvør er tín yndisleikari?**
Liverpool, Steven Gerrard.
**Hvør er tann mest skemtiligi á liðnum?**
Sigtór (tá hann er til venjing).
**Hvør er pressarin á liðnum?** Søren.
**Um tú er/var áleypari, hvør skuldi so verið hin áleyparin?** Tór-Ingar
Stórsta uppliving í fótbóltinum? Einki FM vunni, so uppflytingin í fjør.
**Stutt frágreiðing um títt fótbóltslív.** Byrjaði tá ið eg var 5 ára gamal, síðan tá hevur tað verði fleir upp- og niðurtúrar.



# Vælkomin á nýggja Dungasand!

07 Vestur er eitt felag í stórari menning, og í dag kunnu vit so eisini bjóða vælkomin til fyrsta dystin í EFFO-deildini á nýggja graslíkisvøllinum á Dungasandi.

*Jarnhold Nattestad*
Ítróttarliga verður arbeitt av øllum alvi at hækka støðið, so tilboðini til tey íðkandi alsamt gerast betri. Í sera góðum samstarvi við kommunurnar verður eisini arbeitt við kringumstøðnum – teimum kørmum, vit hava at arbeiða í. Eitt úrslit av hesum tætta samstarvi er nýggi leikvøllurin á Dungasandi, sum vit eru sera fegin um og errin av. Við nýggja húsinum, hava vit nú karmar, ið ikki standa aftanfyri onnur, heldur frammanfyri tey allar flestu.
Men tað mest umráðandi er, at fólkini, sum eru 07 Vestur – vit – trívast saman í hesum umhvørvinum. At vit halda okkum framat at njóta gott av tí, vit hava fingið. Hetta verða øll boðin vælkomin til!
Hendan fyrsta dystin hjá EFFO-liðinum á nýggja teppinum, taka vit ímóti HB, sum áðrenn dystin liggja á 5. plássi, 5 stig framman fyri okkum. Dysturin er í 11. umfari av kappingini. Seinastu fýra umførini hava vit havt truplar útidystir, og, eftir góðu gongdina frammanundan við 7 stigum í tríggjar dystir, hava vit bert fingið 1 stig av teimum seinastu 12.
Avrikini hava tó til deils verið góð, serliga í 2-2 javnleikinum móti Víkingi og í 1-0 tapinum móti KÍ seinasta sunnudag. Klára vit at avrika sum teir dystirnar, taka vit øll 3 stigini í dag, sum sjálvandi er okkara mál.
*Koyrið á 07 Vestur!*



# 07 VESTUR leikarin

**Navn:** Jóannis á Steig
**Aldur:** 20 ár
**Hædd:** 180 cm
**Vekt:** 68 kg
**Yndis matur:** Ræst kjøt.
**Títt pláss á vøllinum:** Vinstri bakkur.
**Vinstra ella høgra bein:** Vinstra.
**Onnur feløg tú hevur leikt við:** 07 Vestur
**Hvørjum liði heldur tú við, og hvør er tín yndisleikari?** Liverpool, Steven Gerrard.
**Hvør er tann mest skemtiligi á liðnum?** Ken.

**Hvør er pressarin á liðnum?** Tórstein.

**Um tú er/var áleypari, hvør skuldi so verið hin áleyparin?** Martin.
Størsta uppliving í fótbóltinum? Flyta upp við 07 Vestur.

**Stutt frágreiðing um títt fótbóltslív.** Havi altíð spælt við 07 Vestur, og komi allarhelst altíð at spæla her.



# effo deildin 2017

Effo ynskir øllum ein góðan dyst

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

SENDISTOVAN

**Sand- og skervsølan í Sandavági**
**Alt innan tilfar - veitan og levering**
**Lastvognskoyring v/Erhard Dam ✆ 213577**



Find us on Facebook
Lastvognskoyring v/ Erhard Dam

# Vága Fysioterapi

v/ Klæmint Isaksen Dip.MDT
Hjørleif Niclasen Cert.MDT,MFE

Fyribyrging, diagnosteriserning

Hornavegur 12
370 Miðvágur
Tlf. 332 007

fysioterapi@fysioterapi.fo




# Tað er heildin, sum telur

Bílegg fund á
**www.banknordik.fo/nordik360**

*Ráðgeving, sum øll skilja*





www.wt.fo






Rammusøla og -verkstaður · Móritsarvegur 1 · FO-188 Hoyvík
tel. +298 25 95 05 · www.facebook.fo/myndlist.fo · myndlist@myndlist.fo

# Pre-Order

**Keyp on-line og slepp undan bíðirøð!**

1 Bilegg og gjald á heimasíðuni

2 Heinta vøruna í handlinum

3 Flúgv út í heim

1 Bilegg og gjald á heimasíðuni

2 Flúgv heim til Føroya

3 Heinta vøruna í handlinum

# Klárt til avheintan - einki roks

Tú kanst nú fáa bílagt og goldið tínar tollfríu vørur longu áðrenn tú kemur í Vága Floghavn.

Vel tínar vørur millum okkara mongu góðu tilboð í **dutyfree.fo**, koyr vørurnar í innkeypskurvina og avgreið ordran við tínum gjaldskorti.

Tá ið tú kemur í Vága Floghavn, hava vit pakka tær vøruna og kanst tú fara beinleiðis víðari á tínari ferð.

Einfalt, skjótt og einki roks.

Les meira og bílegg tínar vørur á **www.dutyfree.fo**.



DUTY FREE FAE

P/F Duty Free FAE Vága Floghavn 380 Sørvágur Faroe Islands Tel. 35 44 00


Banki - Trygging - Pensjón - Heim
Alt á sama stað
betri
Betri pensjón, Eik banki, Tryggingarfelagið Føroyar og Inni skifta navn til Betri. Vit hava savnað allar okkara tænastur, soleiðis at tað gerst bæði lættari og betri hjá tær at vera kundi hjá okkum - alt á einum og sama stað.
betri







ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

Sp/f Mykines
Bryggjan 17
FO-380 Sørvágur
Tel. +298 21 08 70
www.mykines.fo

mykines.fo
must see from sea





IDEmøblar

HÚSFRÍÐKAN

EINGJARTOFTIR 9 • SANDAVÀGUR • TEL 33 33 20






# BUSSKOYRING



- **Til og frá Flogvøllinum**
- **Útferðir kring alt landið**
- **Uttanlandsferðir**

Tlf. 21 98 99






**Alt stoypiarbeiði verður gjørt**

**Erik Heinesen, Bøur**
**Tel: 593602**

Klima



Torkilsvegur 15
360 Sandavágur
+298 333 555
klima@klima.fo

Klima
hevur loysnina til tín, eisini ta grønu





**Birita S. Samuelsen**
Advokatur
birita@sokn.fo
fartlf. +298 283188

**Mimi Steintórsdóttir**
Advokatur
mimi@sokn.fo
fartlf. +298 506030

**Jógvan E. Winther Poulsen**
Advokatur
jewp@sokn.fo
fartlf. +298 219822

SÓKN
ADVOKATAR

J.H. Schrøters gøta 7
Postsmoga 258
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 660500
t-postur sokn@sokn.fo

VP.fo
Vágaportalurin

Vágafólk lesa Vágaportalin

VP.fo
Vágaportalurin

Vága Fysioterapi

v/ Klæmint Isaksen Dip.MDT
Hjørleif Niclasen Cert.MDT,MFE

Fyribyrging, diagnosteriserning

Hornavegur 12
370 Miðvágur
Tlf. 332 007

fysioterapi@fysioterapi.fo

# Nú møta vit aftur HB

**Nú møta vit aftur HB, sum vit eisini leiktu móti fyrsta umfar hetta kappingarárið. Tá vann HB 2-0 á okkum, men hesufer eiga vit heimavøll, á nýggja vøllinum á Dungasandi. Vit hava hitt formannin í HB, sum er Kaj Leo Holm Johannesen, og hava sett honum nakrar spurningar. Kaj Leo hevur spælt 216 dystir í bestu deildini í Føroyum.**

*Jóanis Albert Nielsen*

**Nær byrjaði tú at spæla fótbólt?**

Byrjaði saman við mínum vinmonnum í HB sum pinkulingur tá eg var 7 ára gamal. Eg spældi í byrjanini við á E liðnum sum var tað fimt besta liðið, ella sagt meira beinrakið, eitt av teim ringastu hjá okkum børnum tá. Eg var ikki glaður og helt at lívið var óluksáliga órættvíst at noyðast at spæla við E liðnum.

**Hvønn dyst minnist tú best?**

Eg minnist best tá vit gjørdust føroyameistarar í 1988 og dystin móti Eysturríki í Landskrona í 1990.

**Hvussu ber tað til at tú trakaði til sum formaður í HB?**

Eg var spurdur um eg kundi takað við sum formaður av HB, eg visti at tað fór at verða strævið fíggjarliga eftirsum at eingin inntøka er frá Evropa Cup inntøkum í ár, men eg elski fótbólt og eg elski HB so eg tók av, harumframt sá eg at vit høvdu sera nógv dugnalig fólk í HB.

**Hvussu er tað at vera formaður í HB?**

Tað er nakað serligt at verða HB ari, tær traditiónir okkara felag hevur í føroyskum fótbólti eru "second to none" hetta er eitt orðatak sum sigur, tað besta av tí besta, hetta er nakað sum teir sum undan okkum spældu, hava givið okkum at bera víðari, tað vil siga, vit byggja á herðarnar á teimum sum løgdu lunnar undir okkara vinnaramentan, nakrir av teimum eru til dyst í dag.Okkara søga og okkara traditiónir hava nógv at siga fyri okkara framtíðar mentan, hetta hjálpir okkum at seta prís uppá okkara felags uppruna innan fótbólt, innan gleði, innan grát, innan illsinni, innan vinskap, innan Fair Play, innan tap, innan hjálpsemi, innan eyðmýkt, men lat okkum ikki gloyma, at vit í nútíðini, ongantíð eru betur enn tann síðst leikti dysturin.Tað liggur eitt ótrúliga hart arbeiði aftanfyri alt virksemi sum er í Havnar Bóltfelag, felagið er vorðin ein stórur felagsskapur sum í stødd av tilmeldaðum liðum, er størstur innan føroyskan ítrótt, hetta krevur ein struktur, hvar hvør einstakur veit, hvørja ábyrgd hann hevur, og hvørjar treytir vit arbeiða undir.Vit eru heppin í dag, at hava sera væl skikkaði fólk sum arbeiða fyri okkara bóltfelag, og sum hvønn dag kýta seg, fyri at okkara spælarar kenna seg væl og trívast.Havnar Bóltfelag er eisini eitt stórt arbeiðspláss sum hevur hópin av fólki á lønarlistanum, so tað

krevur sítt at hava eitt arbeiðspláss, hvar tvær mentanir t.v.s bæði amatørar og professionell møtast.

**Hvørjar ætlanir hevur tú sum nýggjur formaður í HB?**

Okkara mál er at fáa fleiri áskoðarar til okkara dystir, so mín áheitan er at taka vinir og familju við tá tit koma at stuðlað HB, hetta hevur alstóran týdning fyri okkra spælarar, at teir kenna fullan stuðul, eisini tá vit av og á ikki vinna eina dyst, síðani fara vit eftir at hækkað okkara limatal av ikki íðkandi limum, soleiðis at vit knýta okkara viðhaldsfólk enn tættari at HB og at vit saman í størri mun fáa tey at kenna seg heima, og enn meira vælkomin enn í dag. Ein miðvís ætlan verður eisini gjørd, fyri at vit skulu duga betur at samskifta okkara kjarnuvirði út til okkara limir, og út í almenna rúmið, hetta er eisini ein partur av okkara sponsorrøkt.

**Hvat er málsetningur hjá HB í ár, og framtíðar planir?**

Tað er eyðsæð sum allir HB arar vita, eingin Europa Cup peningur í ár, hetta



hevur seinastu nógvu árini verði ein stór inntøkukelda hjá HB, so tað skal arbeiðast hart fyri at tryggjað eitt hóskandi inntøkustøðið, samtíðis sum vit gera okkum galdandi til eitt Europa pláss næsta ár, hetta er ikki lætt, men hinvegin sera spennandi at arbeiða við.





VisitVágar | part of the Faroe Islands




**pf. FOSSÁ og HÝSISÁ**

*Tlf. 332691 - Fartlf. 212526 - Fax 333691*
*FO-360 Sandavágur*

## SPEKT kann hjálpa tær við

- Bókhaldinum
- Roknskapinum
- Lønarumsitingini
- Sjálvuppgávuni
- Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
- Rentustuðlinum
- Útlendskum skatti
- Afturrindan av mvg
- Eftirlønum

sansir.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar


Heri Múller **TIMBURMAÐUR**
Junkaravegur 7
340 Kvívík
Tlf. 560560


Betong og timburarbeiði
Jóni Durhuus, byggimeistari • FO-350 Vestmanna • Tlf. 424473 - 223124

# Væl nøgdur seljari

**Nýggi graslíkisvøllurin í Sørvági er tann áttandi, sum Idé Møblar hava selt seinastu átta árini. Talan er um nýggjasta produktið, har stráini hava skrúvuskap og tískil hava lættari við at reisa seg.**

*Ingolf S. Olsen*

Ide Møblar er annað enn bara innbúgv og prýði. Fyritøkan selur eisini graslíkisvøllir, og tann seinasti í røðini er nýggi vøllurin í Sørvági, sum í dag fyri fyrstu ferð skal standa sína roynd.

Ide Møblar hevur selt átta graslíkisvøllir seinastu átta árini – til Trongisvágs, Sands, Sandavág, Eiði, Gøtu, Leirvík, Fuglafjørð og Sørvágs. Men royndirnar eru nógv drúgvari enn tað, tí tað var eisini Ide Møblar, sum seldi fyrsta føroyska graslíkisvøllin, nevniliga tann, sum í 1986 varð lagdur á ovara vøll í Gundadali.

Ide Møblar var tá sponsor hjá HB, sum hevði kenda danan Jack Johnson sum venjara.

- Hann hevði royndir úti í Evropa og kendi til graslíkisvøllir, og tí kom tað í lag. Vit tosaðu við kommununa og keyptu so henda fyrsta vøllin, og líka síðani hava vit fingist við at selja graslíkisvøllir, sigur Birgir Andreasen, stjóri í Ide Møblum.



*Tað er Sørvágs Kommuna, ið eigur fótbóltsvøllin í Sørvági og hevur gjørt íløguna í nýggja graslíkið. Her handar Birgir Andreasen, stjóri hjá Ide Møblum, vøllin til Aimé Jacobsen, borgarstjóra í Sørvágs Kommunu.*

## Frá grúsi til graslíki

Tá í 1986 vóru at kalla allir teir føroysku fótbóltsvøllirnir grúsvøllir, tí grasvøllir vóru dýrir og ringir at halda í váta og ruskusta føroyska veðrinum. Graslíkisvøllir vóru betri egnaðir, men teir vóru nakað heilt serligt tá og ikki góðkendir til altjóða dystir.

Í dag er tað øvugt, nú verður í stórum stíli farið frá grasi til graslíki allastaðni.

Í Føroyum verður bara spælt á graslíki, og nýggjasta ættarliðið av graslíkisvøllum – sum tann í Sørvági – hevur best hugsandi undirlagið at spæla á. Vøllurin

er frá belgiska Domo Sports Grass og er av slagnum Varioslide S Pro.
Stráini í hesum graslíkinum eru fimm sentimetrar long og hava skrúvuskap – tey eru sum smáar fjaðrar, ið beinanvegin reisa seg aftur, tá tú hevur traðkað á tey. Fyrr vóru stráini bein og høvdu lyndi til at leggja seg og ikki reisa seg aftur.

**Umhvørvisvinarligur**
Umframt skrúvustráini eru onnur strá, ið eru ætlað at halda upp á smáu gummikúlurnar, ið gera vøllin passaliga bleytan at spæla á.
- Tað merkir, at spjaðingin av gummi er nógv minni enn á eldru vøllunum, og tað er ein stórur umhvørvisligur fyrimunur. Tú dregur ikki gummi út í náttúruna, tí tað kemur ikki í skógvar og klæði í sama mun sum á øðrum undirløgum. Hetta er bæði orsakað av serligu stráunum, sum halda upp á gummiið, og tí so nógv graslíki er omaná tí. Av somu orsøk er eisini sera lítið brúk fyri eftirfylling av gummi, greiðir Birgir Andreasen frá.
Hóast tað er nógv meira tilfar í nýggju graslíkisvøllunum samanborið við teir gomlu, og teir í allar mátar eru vorðnir betri enn fyrr, so eru teir kortini vorðnir bíligari við árunum.

**Bíligari vøllir**
Tann nýggi í Sørvági kostar 2,5 milliónir krónur. Hann vigar tilsamans eini 200 tons – umleið 100 tons av sandi, útvið 80 tons av gummi og restin graslíki.









- Eg haldi ikki, eg fari skeivur, tá eg sigi, at tann, sum vit løgdu á ovara vøll í Gundadali í 1986, kostaði meira enn hesin nýggi í Sørvági, og allir teir, sum vit hava skift út hesi seinastu árini, høvdu í síni tíð kostað 2,7 – 2,8 milliónir krónur.
- Ein orsøk til, at teir eru bíligari í dag, er, at teir eru vorðnir bíligari at framleiða, men vit sjálvi kunnu sum forhandlari eisini gera tað bíligari nú. Tí tá vit byrjaðu at selja graslíkisvøllir, var tað ígjøgnum annaðhvørt ein danskara ella ein norðmann, men nú hava vit beinleiðis samband við fabrikkina í Belgia og keypa haðani uttan millummenn, sigur Birgir Andreasen.
Umframt fótbóltsvøllirnar hjá fótbóltsfeløgunum selur Ide Møblar eisini fitt av smærri graslíkisvøllum – í hálvari stødd ella minni – til frítíðar- og skúlaøki kring landið.

**Nøgdir týskarar**
Tað er eitt týskt toymi, ið leggur Domo-vøllirnar, sum Ide Møblar selur, á, og sum saman við Ide Møblum standa fyri árliga tænastaeftirlitinum. Týskararnir hava arbeitt við føroyskum fótbóltsvøllum ígjøgnum eini tíggju ár og kenna umstøðurnar og veðrið her. Teir eru fýra mans, sum gera áleggingararbeiðið, men tá teir gera árliga tænastueftirlitið, eru teir bara ein ella tveir umframt ein frá Ide Møblum. Tá fara teir runt til ymisku vøllirnar við serligari útgerð og gera ábøtur, um tað er neyðugt, og reinsa annars vøllirnar fyri órudd og rusk, sum er traðkað niður í teir.
- Týskararnir lata sera væl at samstarvinum, teir hava havt við Sørvágs Kommunu og 07 Vestur. Serliga 07 Vestur-formaðurin Jim Sonni Guttesen hevur imponerað teir, tí hann hevur verið so íðin at hjálpa til. Hann er jú sjálvur gólváleggjari og hevur sýnt stóran áhuga fyri hesum serliga arbeiðnum. Eg havi júst havt samband við týska toymið, og teir bóðu meg heilsa øllum og takka fyri sera gott samstarv og serliga Jim Sonna, sigur Bigir Andreasen.

**Lang livitíð**

Umframt árliga tænastueftirlitið skal vøllurin eisini hava dagligt viðlíkahald. Tað syrgja kommunan og 07 Vestur sjálv fyri. Við í keypinum fylgir serútgerð til tað, ein bust og ein mátta, sum verða drigin eftir vøllinum. Á henda hátt verður vøllurin bustaður 14. hvønn dag, og at draga bust og máttu er ein ATV – eitt lendisakfar – keypt.

Nýggi vøllurin hevur tíggju árs garanti.

- So leingi heldur hann í minsta lagi. Tað valdast sjálvsagt, hvussu nógvir spælitímar verða á honum, men eg vildi mett, at hann kann halda í 15 ár. Stráini eru fimm sentimetrar, har flestu aðrir hava fýra sentimetrar long strá. Eyka longdin ger eisini, at meira er at slíta av, og tað leingir tískil um livitíðina hjá vøllinum, sigur Birgir Andreasen.

Næstu árini væntar hann minni eftir-spurning eftir graslíkisvøllum frá fót-



bóltsfeløgunum og teirra kommunum.

- Nú er tað mesta skift út seinastu árini, so nú verður helst ein steðgur við teimum stóru vøllunum í nøkur ár. Men so tørnar fyri aftur, tá hesir, sum nú eru nýggir, einaferð skulu skiftast, sigur Birgir Andreasen.



# LEIKARALISTI

## 07 VESTUR

| Navn | Pláss | Aldur | Dystir | Min. |
|---|---|---|---|---|
| Torstein Mýlingstind | V | 23 | 10 | 900 |
| Høgni Nielsen | V | 20 | 10 | 894 |
| Martin Tausen | M | 27 | 10 | 878 |
| Gunleif Magnusarson | M | 26 | 10 | 832 |
| Ken Fagerberg | Á | 28 | 10 | 766 |
| Tór-Ingar Akselsen | M-Á | 36 | 10 | 722 |
| Sølvi Egilsson | M | 22 | 9 | 763 |
| Holgar Durhuus | M | 24 | 9 | 743 |
| Petter Bjørlund | V | 27 | 8 | 699 |
| Petur G. Dalbø | V | 26 | 8 | 409 |
| Jóannis á Steig | V | 20 | 8 | 188 |
| Ivan Stojkovic | MV | 40 | 7 | 602 |
| Jákup S. Olsen | M | 22 | 7 | 335 |
| Asbjørn Heðinsson | V-M | 16 | 5 | 194 |
| Silas Eyðsteinsson | MV | 19 | 4 | 298 |
| Søren Nielsen | Á | 26 | 4 | 267 |
| Janus Samuelsen | M | 18 | 4 | 263 |
| Sigtór Asbjørn Petersen | M | 29 | 2 | 135 |
| Rói Hansen | Á | 19 | 1 | 14 |
| Dann Fróðason | M | 16 | 0 | 0 |
| Niels Mouritsen | V | 18 | 0 | 0 |
| Teitur Olsen | M | 18 | 0 | 0 |

**Venjari:** Trygvi Mortensen
**Hjálparvenjari:** Albert Ellefsen

## HB

| | Pláss | Aldur | Dystir | Min. |
|---|---|---|---|---|
| Teitur Gestsson | MV | 24 | 10 | 900 |
| Bartal Wardum | V-M | 20 | 10 | 873 |
| Jóhan Davidsen | V | 29 | 9 | 810 |
| Jógvan Rói Davidsen | V | 25 | 9 | 756 |
| Rókur Jespersen | M | 32 | 9 | 754 |
| Sebastian Pingel | Á | 24 | 9 | 676 |
| Tróndur Jensen | M | 24 | 8 | 466 |
| Adrian Justinussen | M-Á | 18 | 8 | 235 |
| Ári Jónsson | M | 22 | 7 | 630 |
| Levi Hanssen | M-Á | 29 | 7 | 554 |
| Heðin Hansen | M | 23 | 7 | 544 |
| Martin Bergvold | M | 33 | 7 | 520 |
| Símun Samuelsen | M-Á | 32 | 7 | 423 |
| Aleksandar Stankov | M-Á | 26 | 6 | 528 |
| Ari Olsen | Á | 19 | 6 | 72 |
| Dánjal Pauli Lervig | V | 26 | 5 | 381 |
| Heri Mohr | M | 20 | 4 | 141 |
| Daniel (Elly) Pedersen | Á | 28 | 3 | 242 |
| Poul Thomas Dam | V | 29 | 3 | 207 |
| Daniel Johansen | V-M | 18 | 3 | 156 |
| Andrew av Fløtum | Á | 37 | 1 | 26 |
| Hans Jákup Annfinsson | Á | 18 | 1 | 6 |
| Tróndur Vatnhamar | MV | 37 | 0 | 0 |
| Hjalti Djurhuus | V-M | 18 | 0 | 0 |
| Jákup Pauli Breckmann | V-M | 19 | 0 | 0 |
| Mattias Lamhauge | MV | 17 | 0 | 0 |

**Venjari:** Sigfríður Klementsen

FAROE SOCCER.com
Føroysk fótbóltshagtøl



unicar.fo
FAIR CAR RENTAL - +298 544 000
BILAR TIL SØLU Á UNICAR.FO

Faroe Travel
- Ferðaseðlar um allan heim
www.travel.fo

Skógvar og klæðir til kvinnur og menn
John Poulsen
FO-385 Vatnsoyrar . Tlf. 332034 . jp@johnpoulsen.fo

CARRO
carro.fo - 21 25 51

# Biggi er multifjeppari

**Biggi er fastur fúsur á síðulinjuni, tá 07 Vestur spælir dyst, og syrgir við trummusláttri og eggjandi rópi fyri, at bæði spælarar og áskoðarar eru væl upplagdir.**

*Ingolf S. Olsen*

Fyrst B36'ari, síðani AB'ari og nú 07 Vestur-fjeppari. Men øll trý feløgini rúmast væl í brennandi fótbóltshjartanum hjá Hans Birgir Hansen, betur kendur sum Biggi.

Hann er ein kend býarmynd í Havn, men tað er nú ikki uttan orsøk, at hann hevur fingið serligan tokka til 07 Vestur. Í móðurætt er hann nevniliga hálvur sørvingur.

Í nógv ár birti Biggi við trummuspæli og herrópum undir fótbóltshýrin á síðulinjuni til dystirnar hjá barndóms-felagnum B36. Men fyri einum tíggju árum síðani kom ein lítil kuril á tráðin millum hann og onkrar áskoðarar, so fyri frið skyld gjørdi hann av at halda seg burtur eina tíð.

- B36 er mítt barndómsfelag, og so tað fer altíð at vera mítt lið, men teir klára seg fínt og hava góð fólk á síðulinjuni. So tá tey á Argjum spurdu, um eg ikki kundi koma har at heppa, so gjørdi eg tað, greiðir Biggi frá.

## AB og 07 Vestur

Á Argjum hevur hann eisini álitis-uppgávur fyri felagið, hjálpir millum annað til at gera klárt til dystir og rigga av aftaná – umframt sjálvsagt at vera fremstur í fjepparakórinum.

Og nú syrgir hann so eisini fyri at koyra á spælarar og áskoðarar hjá 07 Vestur.

- Onkur spurdi meg fyrr í vár, um eg ikki kundi koma at heppa á teir. Eg eri hálvur sørvingur, so tað vildi eg væl. Tað var ímóti HB í Havn, eg byrjaði so spakuliga at rópa og finna út av tí, og í hálvleikinum var eg ordiliga tendraður, so seinna hálvleik hoyrdist eg um allan vøllin.

- Eg heppaði eisini á 07 Vestur, tá vit taptu 4-0 á B36. B36'arnir vóru púra paff, tá teir sóðu meg standa í skýlinum hinumegin og rópa á eitt bygdalið, flennir Biggi.

## Máttmikil rødd

Hann hevur altíð gingið høgt upp í sunnan lívsstíl og at eta heilsugóðan mat, og hann gevur einum serligum kostískoyti æruna fyri, at røddin í seinastuni er vorðin meira máttmikil og serliga væl egnað at rópa herróp til frama fyri síni lið.

Hann er avhaldsmaður, tí, sum hann skemtandi sigur, "um eg drakk, so hevði eg helst verið ákærdur fyri at vera normalur".

Biggi ger meira enn bara at heppa og trumma, tá hann ger sína skyldu á síðulinjuni. Hann leggur eisini íðin spælarunum lag á og er sannførdur um, at teir bæði lurta og akta.

- Tá eg havi verið á síðulinjuni, og teir



*Leygardag heldur Biggi við AB, sum nú spælir í 1. deild, men sunnudag, tá Effo-dystirnir oftast verða spældir, er hann 07 Vestur-fjeppari um ein háls. Fótbóltshjartað slær tó eisini fyri B36, sum er hansara barndómsfelag.*

hava brúkt taktikkin hjá mær, so hevur tað gingið væl, men tá eg ikki havi verið har, so hevur tað ikki gingið so væl, sigur Biggi.

**Ítróttarmaður**

Sjálvur hevur hann altíð verið ítróttarmaður. Hann spældi við B36 sum heilt ungur, og eftir at hann á heysti 1971 hevði verið á fimleikaháskúla í Århus, fór hann í 1972 at venja unglingarnar hjá B36.

- Eg fái ofta at vita enn, hvussu gott tað liðið var, sigur Biggi.

Annars gjørdi hann í síni tíð fimleik í Havnar Fimleikafelag. Hann hevur eisini róð og gingið til dans – Biggi er tiltikin góður dansari – men seinnu nógvu árini er tað renningin, sum hevur verið hansara ítrótt.

Hann rann á Oyggjaleikunum, sum vóru í Føroyum í 1989, og hann hevur sum tann einasti runnið øll Tórshavn Marathon, síðani byrjanina í 2003.

**Tórshavn Marathon**

Biggi, sum nú er 67 ár, er eisini við, nú Tórshavn Marathon fyri 15. ferð verður runnið í dag, og tí fær hann tíverri ikki verið á síðulinjuni við sínum eggjandi trummuslåttri og rópum til dagsins heimadyst ímóti HB.

- Tað verður kanska ov friðarligt í skýlinum, men eg vóni tó, at tað fer at gangast teimum væl. Eg vóni eisini, at nýggja graslíkið fer at roynast væl, og eg vænti heilt vist, at 07 Vestur fer at klára at verða hangandi í Effo-deildini – tað er tað, vit skulu satsa upp á, sigur Biggi.


POLARIS
4A
www.4a.fo
Bakkavegur 35 • 380 Sørvágur • +298 22 87 41 • 4a@4a.fo


Spf. KJO v. Kristian Olsen
Sørvágur
Tel 210452-210952
Maskin og Lastvognskoyring


WENGER
SAMLA
MERKIR
FYRSTA FLOKS TASKUR
OG KUFFERT
Føroya Keypssamtøka
fk
Tín handil
Til og við
10. JUNI 2017
fært tú eitt samlimerki,
fyri hvørjar 50 kr, ið tú
keypir fyri í tínum
FK handli.
Einans
limir í FK
kunnu gera nýtslu
av merkjunum









**Neinbjørn Nattestad**
Bilverkstaður
**Tlf. 332727 | Fax. 333727**



Sportigan

ÍTRÓTTUR. ALT ÁRIÐ.

KEYP EISINI OKKARA VØRUR
Á FØROYA FEITASTA NETHANDLI

**WWW.SKALKUR.FO**

ÓKEYPIS TIL DYRNAR
Í ØLLUM FØROYUM.

| SMS 31 95 12 | SALTANGARÁ 45 95 12 |

# VIÐLÌKAHALDSFRÌTT











## PLASTKLÆDNING OG BJÀLVING

Vit umboða dygdar húsaklæðningin úr plast.
Týski klæðningurin er sera væl egnaður til føroyska veðurlagið.

10 ymiskir litir eru at velja í,
og horn og listar fáast í somu litum.

Brettini eru heili 6 metur til longdar.

**SANDAVÁGS TIMBURHANDIL**

Hillingatangi - 360 Sandavágur - Tlf. 332700 - www.timbur.fo


Vit knýta Føroyar
nærri at umheiminum
við 2.900 fráferðum og komum árliga - beinleiðis til 12 ymisk ferðamál
REYKJAVÍK
FØROYAR
BERGEN
AALBORG
EDINBURGH
BILLUND
KEYPMANNAHAVN
BARCELONA
MALLORCA
LISSABON
KRETA
GRAN CANARIA
Okkara flogfør eru serútgjørd
til at flúgva upp á Føroyar
Á føroyskum veingjum í útvið 30 ár
Til gaman og álvara, sól og summar,
vinnu og mentan
Serføroysk tænasta
Kappingarførir prísir
#FLÚGVAFYRIFØROYAR
Atlantic Airways
Vagar Airport
380 Sørvágur
Tel 34 10 00
www.atlantic.fo
ATLANTIC
AIRWAYS

# BURÐARDYGGUR
# HAVBÚNAÐUR



